## Fundur um altjóða handilsviðurskifti

Uttanríkisráðið hevur tikið stig til at skipa fyri fyrilestri um handils,- og altjóða rættarlig atlit Føroya við World Trade Organization. Løgfrøðiligur ráðgevi í rættardeildini hjá WTO kemur í hesum sambandi at halda fyrilestur á námsskeiðinum, har hesin fer at viðgera ymisk føroysk handilsviðurskifti í samband við galdandi WTO íbindingar, skrivar tinganes.fo. Harumframt verður greitt frá tilgongdini við multilaterala WTO sáttmálanum um fiskivinnustuðul, eins og nortið verður við hvørjar løgfrøðiligar forðingar eins og møguleikar skulu greiðast, um Føroyar skulu gerast sjálvstøðugur limur í WTO. Fyrilesturin verður í Klingruni í Norðurlandahúsinum mánadagin 20. oktober frá klokkan 13 til 17.

## Trygg íløga góðan vinning

Føroya Banki bjóðaði fyri tveimum árum síðan øllum at gera trygga íløgu í lánsbræv, sum fylgdi gongdini hjá kinesiska, russiska og turkiska gjaldoyranum. Nú íløgutíðarskeiðið er av, vísir hetta ein kursvinning hjá íleggjarunum upp á 21,60 prosent. Hetta skrivar heimasíðan hjá Føroya Banka. Íløguproduktið plus3 valuta 2008 var ein sonevnd trygg íløga, har íleggjararnir høvdu vissu fyri, at allur tann ílagdi peningurin fekst aftur, um so gjaldoyruni viknaðu í íløgutíðarskeiðnum frá 9. oktober 2006 til 9. oktober 2008. Tey trý gjaldoyruni styrktust í íløgutíðarskeiðnum, og tí fáa íleggjararnir ikki bara innskotna peningin aftur, men eisini gott avkast. Byrjunarkursurin var 103, og endakursurin gjørdist 124,60, skrivar foroya.fo.

# Framtíðar flogvøllur kann bara

**- Suðurstreymur er einasta stað í Føroyum, har vit sleppa undan turbulensi, sigur Bjarki Jensen, royndur tyrluskipari**

ALTJÓÐA FLOGVØLLUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*- Skulu vit hugsa um at gera ein stóran, altjóða flogvøll í Føroyum, eiga vit at kolldøma bæði Søltuvík og Skorðhæddina beinanvegin og í Vágum fáa vit ongantíð ein góðan vøll, hvussu nógv hann so verður longdur, tí har er alt ov nógvur turbulensur, sigur Bjarki Jensen, tyrluskipari*

Skulu vit hugsa um at gera ein stóran, altjóða flogvøll í Føroyum, er tað bara ein møguleiki og tað er at gera hann í Suðurstreymur.

Tað staðfestir Bjarki Jensen, royndur tyrluskipari.

- Eg havi alla tíðina hildið og eg haldi framvegis, at skulu vit hava ein altjóða flogvøll í Føroyum, er tað bara Glyvursnes, sum kann koma upp á tal.

Bjarki Jensen sigur, at hann hevur ikki hugsað um Nólsoy í hesum sambandi fyrrenn ein dulnevndur flogskipari nevndi Nólsoynna, sum ein møguleika.

- Har eru viðurskiftini helst ikki øðrvísi enn á Glyvursnesi, so er lendi hóskandi í Nólsoy, ber nokk eisini væl til at gera hann har eisini.

### Vítt til veggja

Bjarki Jensen sigur, at tað er tað lága, rundleitta lendið í Suðustreymur, sum ger, at ongin turbulensur er har um leiðir.

Harafturat er Sandoyggin rættiliga fløt, samstundis sum at hon er nakað langt burtur og tí hevur hon ikki nakra serliga ávirkan á suðurendan á Streymoynni og á Nólsoynna.

- Í Suðurstreymi er vítt til veggja. Suður og eystur í havið er púra onki fyri. Sostatt er Suðurstreymi so langt frá fjøllum, sum tað yvirhøvur ber til at sleppa nakrastaðni í Føroyum.

### Kolldømir tríggjar møguleikar

Bjarki Jensen sigur, at skulu vit hugsa um turbulens, er ongin ivi um at bæði Vágar, Søltuvík og Skorðhæddin verða kolldømd at gera flogvøll á

Hann skilir onki av, at nakar tekur Skorðhæddina í Eysturoy upp á tunguna, tá ið tosað verður um ein framtíðarflogvøll.

- Har er hopleyst at flúgva, tí har skalt tú bæði koma og fara yvir hægstu fjøllum í landinum.

Hann sigur, at í Søltuvík hava teir eisini roynt at flogið inn yvir við tyrluni, sum um at teir ætlaðu at lenda.

- Har er líka ringt til turbulens, sum tað er í Vágum á útsynningi og er hann vestan, er tað ikki lukkuligt, sum tað er harður turbulensur av Skúvoynni, sum er at kalla lodrøtt. Við sjálva Søltuvíkina er eisini høgt lodrætt fyri, hóast tað er lægri, men eisini tað elvir til harðan turbulens.

Men nú er avgjørt at longja vøllin í Vágum og tað verður enntá tosað um at gera ein krossvøll í Vágum.

- Eg skilji onki, tí vøllurin í Vágum verður ongantíð brúkiligur, av tí at har er so nógvur turbulensur av fjøllunum og vestursíðuni á oynni.

- Ringasti parturin av hvørjum einasta flúgvitúri er byrjanin, tá ið vit fara upp frá í Vágum, og til vit er komin leys av Vágum og so endin á túrinum, tá ið vit fáa fatur á Vágoynni aftur, tá ið vit skulu lenda, sigur Bjarki Jensen.

- Tað at flúgva úr Vágum og í Vágar er altíð nógv tað strævnasta av eini flogferð, tá ið ivaveður er, og tað er tað so ógvuliga ófta í Føroyum, tí veðurlagið er ringt, leggur hann afturat.